Zarepta, mai 2010.

# Kæru samverkafólk!

Í ár eru 45 ár liðin, síðan summarlegurnar byrjaðu við Áir. Hetta var í 1965.

Í 1967 vóru legurnar fluttar til Vatnsoyrar, og hava legur verið har síðan tá.

Harrin hevur signað hetta verk ríkliga, og varðveitt okkum frá álvarsomum vanlukkum øll hesi mongu ár.

Vit kunnu tí ikki annað enn takka Honum fyri góðsku Hansara, og er tað bøn okkara, at Hann framvegis skal signa og varðveita hetta verk.

**Broytingar í leiðsluni.**

Aftur í ár eru broytingar í leiðsluni í Zarepta. Afturat John í Skemmuni og Páll á Lakjuni eru nú eisini Jens Bech og John Færø komnir við í leiðsluna.

Arbeiðið er stórt og umfatandi, og er tað gott og neyðugt at fáa yngri kreftir við í arbeiðið. Vit báðir, sum frammanundan eru í leiðsluni, takka Harranum fyri hesar brøður og vilja vit heita á systkin okkara um at minnast teir í bønum tykkara.

Eisini eru vit takksom fyri, at tað alla tíðina koma nýggj fólk inn í øll tey ymisku arbeiðsøkini í Zarepta.

**Viðlíkahald.**

Húsini og økið við Zarepta verða alla tíðina røkt og hildin við líka, og takka vit teimum, ið við trúfesti eru við í hesum týdningarmikla arbeiði.

Fyri stuttum eru húsini gjørd høvuðsrein. Samstundis er ymiskt málað, og eru vit eisini takksom fyri tey mongu, sum hava verið við í hesum arbeiði.

**Leguskráin.**

Fyrsta legan í ár var frá 29. apríl til 2. mai. Tað var legan fyri fólk, ið hava brek, og vikuskiftið 14.-16. mai var lega fyri støk.

Familjulegurnar eru 6 í tali, harav ein teirra er fyri familjur hjá børnum, ið hava brek.

Fýra tær fyrstu eru fyri summarfrítíðina, og byrjar tann fyrsta fríggjadagin tann 28. mai.

Summarlegurnar byrja sunnudagin tann 27. juni við leguni fyri tey 15-16 ára gomlu.

Síðan halda summarlegurnar fram alla summarfrítiðina. Tann seinasta, sum er legan fyri tey 9 ára gomlu, endar hósdagin tann 12. august.

Eftir hetta verða so tvær familjulegur og bíbliuskeiðið.

Í septembur og fyrst í oktobur verða vikuskiftislegurnar: Lega fyri 17 ár og eldri, mansstevna, kvinnustevna og tvær hjúnarlegur.

Seinasta legan, ið Zarepta skipar fyri, er heystlegan, sum er fyri 15-17 ára gomul.

**Broytingar í leguskránni.**

Nakrar broytingar eru í ár gjørdar í leguskránni.

Broytingarnar, ið eru gjørdar, hava við familjulegurnar, fyrstu summarleguna og leguna fyri 18 ár og eldri at gera.

Tær fyrstu familjulegurnar áðrenn summarfrítíðina byrja nú fríggjadag.

Ungdómslegan, sum í fjør var fyri 15-17 ára gomul, verður í ár fyri 15-16 ára gomul.

Og legan fyri 18 ár og eldri verður í ár broytt til at eita 17 ár og eldri.

**Starvsfólk og leiðarar.**

Tað er av ómetaliga stórum týdningi, at vit eru væl mannað til hesar legur við hjálparfólki.

Tær legur, ið tykjast at verða tær torførastu at manna, eru familjulegurnar og fyrstu summarlegurnar.

Um onkur hevur nakrar frídagar áðrenn summarfrítíðina, meðan familjulegur eru, høvdu vit sett stóran prís upp á hjálp tína til onkra av teimum. - Brúk er fyri fólki í køkin, uppvaskið, matarhøllina, reingerð um dagin og náttarvakt.

Til summarlegurnar er týdningarmikið at hava nóg mikið av leiðarum og tilkomnum náttarvaktum.

**Biðið fyri okkum!**

Kæru systkin, haldið á at biðja fyri verkinum í Zarepta. - Vit eru í einum veruligum bardaga millum Harra okkara og vald myrkursins.

Latið okkum minnast, at avgerandi bardagin fer fram í bønarlívi okkara. ”<u>Bið lítið, og tú falla má, bið nógv, og tú skalt sigur fá! Ja, Satan skelvur, tá ið hann eitt veikt Guds barn á knøum fann</u>”. (SGF 753).

**Tykkara í verkinum í Zarepta.**

**John í Skemmuni, Jens Bech,**
**Páll á Lakjuni og John Færø.**